HÆDD

25 gentur eru í skúlaflokki. Miðalhæddin á gentunum er 130 cm..

Spurningur 1: HÆDD

M421Q01 - 0 1 9

Greið frá, hvussu miðalhæddin verður roknað.

Spurningur 2: HÆDD

M421Q02

Set ring um “Rætt” ella “Skeivt” við hvørja av útsagnunum niðanfyri.

Útsøgn	Rætt ella Skeivt
Er ein genta í flokkinum 132 cm høg, so má eisini ein genta vera, sum er 128 cm til hæddar.	Rætt / Skeivt
Meginparturin av gentunum mugu vera 130 cm høgar.	Rætt / Skeivt
Um tú skipar allar genturnar á rað eftir hædd frá lægstu til hægstu, so má gentan í miðjuni vera 130 cm til hæddar.	Rætt / Skeivt
Helvtin av gentunum í flokkinum má vera lægri enn 130 cm, og helvtin av gentunum má vera hægri enn 130 cm.	Rætt / Skeivt

Spurningur 3: HÆDD

M421Q03

Eitt mistak var gjørt, tá ið ein næmingur varð mátaður. Hæddin átti at verið 120 cm í staðin fyri 145 cm. Hvat er tann rættaða miðalhæddin hjá gentunum í flokkinum?

A 126 cm
B 127 cm
C 128 cm
D 129 cm
E 144 cm